# Met hjá ConocoPhillips

Norska dóttirfelagið hjá ConnocoPhilips, ConocoPhillips Norge, hevur ongantíð havt eitt so stórt tal á niðastu linju í rakstrarroknskapinum sum í fjør. Rakstrarinntøkurnar vóru næstan 39 milliardir norskar krónur, og avlopið bleiv góðar sjey milliardir. Í báðum førum er talan um met, skrivar Aftenbladet. Í frágreiðingini til roknskapin verður sagt, at framleiðslan í 2008 var 75,8 milliónir tunnur ella 207.000 tunnur um samdøgrið. Steinar Våge, stjóri í Connoco Philips Norway, sigur í viðmerking til roknskapin, at úrslitið er sjálvandi merkt av, at prísurin á olju og gassi var søguliga góður í fjør.




# Týskarar keypa minni

Samstundis sum arbeiðsloysið í Týsklandi veksur, minkar sølan í handlunum kring landið. Ein nýggj uppgerð vísir, at í fyrsta ársfjórðingi var sølan í handlunum 3,2 prosent minni enn í sama tíðarskeiði í fjør. Minkingin frá februar til mars var júst eitt prosent, og tað var meiri, enn búskaparfrøðingar høvdu ræntað, skrivar DPA. Í mars keyptiu týskarar trý prosent minni mat, drykkjuvørur og tubbak enn í sama mánaði í fjør. Búskaparfrøðingar halda, at gongdin í Týsklandi kann fáa evropeiska miðbankan til at lække rentuna uppaftur meiri, enn hann longu hevur gjørt. Tann týski búskapurin er tann største í evruøkinum.

# Byrjaðu við løttum rættum – nú hava tey eisini tað váta

**Joan Mikkelsen sigur, at tey eru væl nøgd við undirtøkuna, sum Kaféin í Hópinum hevur fingið. - Her kemur væl av fólki, og væl verður selt út av húsinum. Tað eru ikki bara fólk í Nes kommunu sum keypa, men eisini fólk aðrastaðni, sigur hon**

TOFTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hálvan august í fjør læt Kaféin í Hópinum á Toftum upp. Tað vóru tær báðar systrarnar, Susan Johannesen og Joan Mikkelsen, sum fóru í holt við at reka kafé á Toftum.

Í stuttum kunnu vit siga, at tær byrjaðu við teimum "løttu" rættunum – rundstykkjum, toast, pitabreyði og sonevndum ciabattabreyði við høsnarunga, salat og karrydressingi.

Tað var tó skjótt, at systrarnar sóu, at hetta fór at gerast ov lítið, um grundarlag skuldi vera fyri kaféini.

## Øktu um útboðið

– Seint í fjør fóru vit tí eisini at bjóða allan vanligan grillmat, eitt nú kips, burgarar, høsnarungar og fisk & kips. Haraftrat kunnu vit bjóða vaflur við ísi og ískakao, sum fólki dámar væl.

Joan Mikkelsen sigur, at tá tey øktu um útboðið í desember, fingu tær eisini meira at gera, og tað fór at ganga betri.

Tær eru tríggjar, sum skiftast um at arbeiða í kaféini og umframt Joan og Susan, arbeiðir eisini Leila á Argjum hjá teimum.

– Tað kallast, at ein er til arbeiðis í senn, men ofta er so mikið at gera, at tvær noyðast at vera til arbeiðis, sigur Joan.

Hon vísir á, at tær í byrjanini royndu ymiskar upplatingartíðir, men tað vísir seg, at mest er at gera út á dagin og um kvøldarnar. Tí er kaféin nú opin burturav hvønn dag í viku frá klokkan 17-23.

## Hálvt skeinkiloyvi

Tá løgreglan fyri út við einum ári síðan sendi eina umsókn frá Kaféini í Hópinum um hálvt skeinkiloyvi til ummælis hjá Nes kommunu, tók eingin í bygdarráðnum undir við hesum. Øll atkvøddu ímóti uttan borgarstjórin, Símun Johannesen, sum atkvøddi blankt.

Men í dag hevur kaféin kortini fingið sítt hálva skeinkiloyvi, tó at bygdaráðið ongantíð hevur viðmælt.

Joan vísir á, at skeinkiloyvið, sum loyvisnevndin hevur givið teimum, er dagfest 6. mars í ár, og nú hava tey loyvi at skeinkja øl og vín í tímunum frá klokkan 11 á morgni til 23 á kvøldi.

Spurd, um tey hava havt meira at gera, síðan tey fóru at skeinkja, sigur Joan, at tey í øllum førum ikki hava havt minni at gera.

– Hóast vit hava loyvi at skeinkja frá klokkan 11 á morgni, lata vit sum er ikki dyrnar upp fyrr enn klokkan 17, leggur hon aftrat.

Leygardagin komandi, nú bátafestivalur verður á Toftum, er ætlanin tó at hava opið frá klokkan 11.

## Fólk hugna sær

Joan sigur, at tey eru væl nøgd við undirtøkuna, sum Kaféin í Hópinum hevur fingið.

– Her kemur væl av fólki, og væl verður selt út av húsinum.

Hon sigur, at tað ikki bara eru fólk í Nes kommunu sum keypa, men eisini fólk aðrastaðni, og tá er tað serliga grillmaturin, tey koma aftur.

Fólk keypa heim við, og tað eru eisini tey, sum koma innar at seta seg at eta og soleiðis kunnu njóta ta tænastu, sum Kaféin í Hópinum hevur.

– Vit hava nøkur pláss í stovuhæddini, har diskurin er, og vit hava eisini nøkur pláss uppi á loftinum.

Joan sigur, at ungdómur situr og spælir kort ella yatsy, og tá áhugaverdir fótbóltsdystir eru í sjónvarpinum, plaga tey at vísa dystirnar á flatskermi.

## Automat niðanfyri

Niðanfyri í bygninginum hava tey søtmetis-og sodavatnsmaskinu, har keypast kann um kvøldarnar og næturnar, tá alt annars er stongt.

– Maskinan hevur fingið góða undirtøku, og tað er ikki sjáldan, at hon næstan er tóm sunnumorgnar, sigur Joan Mikkelsen.




*Upprunaliga eru hetta eini sethús, sum nú eru riggaði til kafé. Fólk kunnu sita í stovuhæddini, og nøkur pláss eru eisini á loftinum* Mynd: Vilmund Jacobsen



*Tað eru tær tríggjar, systrarnar Susan og Joan og Leila á Argjum, sum standa fyri tænastuni í Kaféini í Hópinum á Toftum* Mynd: Vilmund Jacobsen

# Hjá Pidda – einasti Samkeyp-handil í økinum

TOFTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Toftum er einasti Samkeyp-handil í økinum. Tað er matvøruhandilin Hjá Pidda, sum Kristian Suni Haraldsen, vanliga róptur Bassi, eigur og rekur.

Hjá Pidda hevur opið hvønn dag í viku frá klokkan 9-22, leygardagur íroknaður.

Vanliga eru einar fýra kvinnur knýttar at handlinum í senn, men arbeitt verður ymiskar og forskotnar tíðir gjøgnum tann langa dagin.

Samlaða talið av fólki, sum arbeiða í handlinum gjøgnum eina viku, er tó væl størri, tí leygardagar er vanligt, at ungar gentur eisini traðka til.

Hjá Pidda er nútímans matvøruhandil, sum hvørja viku hevur góð Samkeyptilboð.

– Fólk í økinum eru óført at keypa hjá okkum, men vit síggja eisini væl av fólki, sum leita úr øðrum økjum og higar at keypa, siga tey Hjá Pidda.

Kristian Suni Haraldsen hevur eisini vistir, sum tað verður rópt. Hetta er provianteting til skip, og provianteringsgoymsla er á Kambsdali.

Nógv skip og bátar vitja á Toftum millum ár og dag, nú Fiskamarknaður Føroyar hevur sína høvuðsstøð her.

Tí er provianteringsbilurin hjá Bassa ikki nakar fremmandur "gestur" í Nes kommunu.



*Hjá Pidda hevur opið hvønn gerandisdag í viku frá klokkan 9-22* Mynd: Vilmund Jacobsen